## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig. Um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og fyrrapartin regn, annars yvirhøvur turt, men támut. Um kvøldið aftur regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Bogatunnil undir Leirvík



*Hetta er fyribilstekningin yvir hvar ein tunnil undir Leirvíkar bygd møguliga kann liggja. Men tað er bert ein leystlig meting, tí ongar jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar*
*Mynd: Landsverkfrøðingurin*

**Vinnumálaráðið hevur gjørt eitt uppskot um tunnil undir Leirvíkar bygd. Og Landsverkfrøðingurin hevur gjørt eina fyribilstekning**

TUNNILSGERÐ
*Solby A. Eliasen*

Á fyribilstekningini frá Landsverkfrøðinginum yvir tunnilin undir Leirvíkar bygd, sást at um henda ætlanin verður framd í verki, so kemur tunnilin at ganga í einum boga undir bygdini. Men sagt verður, at henda tekningin er ógvuliga fyribils, tí ongar jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar. Tí er henda ætlanin ein leystlig meting um, hvar ein tílíkur tunnil kann verða, verður sagt frá Landsverkfrøðingin.

Uppskotið frá vinnumálaráðnum staðfestir sum sagt, at tunnil skal gerast undir Leirvíkar bygd. Tað kom fyri á formligum landsstýrisfundi mikudagin, har tað var góðkent. Síðani fer uppskotið niðan í tingið, og væntandi kemur tað fyri á tingfundi týsdagin.

Bjarni Djurholm sigur, at lógin um fast samband um Leirvíksfjørð sigur, at landsstýrismaðurin skal taka støðu til, um tunnilin undir bygdina skal gerast ella ikki. Men av tí at hetta er ein verkætlan sum kemur at kosta nærum tað dupulta, sum ein vegagerð, so metir landsstýrismaðurin ikki, at hann einsamallur hevur heimild til at taka avgerðina. Tí hevur hann gjørt av, at uppskotið skal leggjast fyri tingið.

Upprunaliga var ætlanin at gera eina nýggja lóg um tunnilsgerð undir Leirvík, men av tí at tær neyðugu metingarnar og forkanningarnar ikki eru lidnar enn, so hava tey í staðin gjørt eitt uppskot um broyting í lógini um fast samband um Leirvíksfjørð. Hetta fyri, at arbeiðið við undirsjóvartunnilin kann halda fram. Tí lógin ásetur at landsstýrismaðurin skal hava tikið støðu til málið, áðrenn arbeiðið við sjálvum tunlinum kann halda fram.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷11 |
| Qaqortoq | ÷7 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | ÷6 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | ÷4 |
| Berlin | ÷1 |
| Warzawa | ÷7 |
| Kiev | ÷7 |
| Bukarest | ÷6 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 10 |
| Róm | – |
| Malorca | 13 |
| Athen | – |
| Malta | 11 |
| Tunis | 9 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | – |
| New York | ÷1 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 960 hPa eystan fyri Hvarvið fer spakuliga norðureftir og grynnist. Kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið fer móti Grønlandsfjørðinum og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/02 kl. 06⁰⁰– 13/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,1 mm – mált frá 12/02 kl. 06⁰⁰–13/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 57,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. febr.: Mánin longst frá jørðini
9. febr.: Fyrra kvarter
16. febr.: Fullmáni
19. febr.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 14. feb | 04.26 | 16.51 | 03.26 | 15.51 | 03.41 | 16.06 | 06.26 | 18.51 | 07.26 | 19.51 | 02.41 | 15.06 | 01.41 | 14.06 | 04.41 | 17.06 | 05.41 | 18.06 | 04.11 | 16.36 | 05.26 | 17.51 |
| 15. feb | 05.17 | 17.42 | 04.17 | 16.42 | 04.32 | 16.57 | 07.17 | 19.42 | 08.17 | 20.42 | 03.32 | 15.57 | 02.32 | 14.57 | 05.32 | 17.57 | 06.32 | 18.57 | 05.02 | 17.27 | 06.17 | 18.42 |
| 16. feb | 06.08 | 18.29 | 05.08 | 17.29 | 05.23 | 17.44 | 08.08 | 20.29 | 09.08 | 21.29 | 04.23 | 16.44 | 03.23 | 15.44 | 06.23 | 18.44 | 07.23 | 19.44 | 05.53 | 18.14 | 07.08 | 19.29 |
| 17. feb | 06.51 | 19.14 | 05.51 | 18.14 | 06.06 | 18.29 | 08.51 | 21.14 | 09.51 | 22.14 | 05.06 | 17.29 | 04.06 | 16.29 | 07.06 | 19.29 | 08.06 | 20.29 | 06.36 | 18.59 | 07.51 | 20.14 |

5 707265 100050 >